DAGSINS MEINING

Umhvørvisligur eftirbátur!

Landsstýrismaðurin í umhvørvismálum heldur, at vit eru væl fyri umhvørvisliga. Tað segði hann í øllum førum við Sjónvarp Føroya á veg til Johannesburg í Suðurafrika, har tann stora ráðstevnan er í hesum døgum um umhvørvi og burðardygga menning.

Men tann ágrýtni formaðurin í Føroya Umhvørvisverndarfelag Kári Thomsen er ikki samdur við Eyðun Eltør, og eitt innslag í somu Degi og Viku gjørdi orðini hjá landsstýrismanninum fullkomiliga til skammar.

Í tí innslagnum avdúkaði tann framskygni og umhvørvistilvitandi stjórin á IRF, Poul Andreas Joensen, at nærum einki rusk kemur aftur frá teimum føroysku skipunum. Meginparturin fer í tann stóra ruskdugan - havið. Havið, sum øll okkara tilvera er bygd á. Havið - Heimsins reinasta hav - sum ávarpið, tá vit selja okkara fiskavørur.

Eyðun Eltør, tú hevur okkurt at gera, tá tú kemur heimaftur.

Fundurin í Johannesburg verður hildin 10ár eftir fundin í Rio. Landsstýrismaðurin heldur, at nógv er hent síðani. M.a. nevnir hann, at vit hava fingið brennistøðirnar, skiljing, tyrving, oljumóttøku o.a.fr. Víst so, men hetta vóru sjálvfylgjur, sum skuldu verið komnar langt frammanundan, so hasum kunnu vit ikki reypa okkum av, hóast vit eiga at fegnast um øll tey framstig, sum serliga IRF hevur slóðað fyri.

Men hevur Eyðun Eltør, landsstýrismaður í olju- og umhvørvismálum, gloymt, at hvørki brennistøðin á Sandvíkarhjalla ella brennistøðin á Hagaleiti lúka føroysku ella altjóða umhvørvistreytirnar? Stjórin og starvsfólk á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni hava í fjølmiðlum greitt víst á, at brennistøðirnar dálka so illa, at ov nógv av tí eitrandi og krabbbameinselvandi evninum dioxin er í seyði, sum gongur í høgunum nærhendis støðunum!!!

Gjørdi Heilsufrøðiliga Starvsstovan rætt, gav hon IRF og KOB eina avmarkaða tíð at fáa viðurskiftini í rættlag. Megnaðu støðirnar, og teir politisku myndugleikar, sum varða av teimum, ikki at fáa viðurskiftini í rætt lag, skuldu tær verið stongdar. Tá høvdu myndugleikarnir helst - ella kanska - rakna við. Men tað er ikki vist. IRF hevur staðiliga víst á trupulleikarnar, men okkara góða landsstýrið vildi ikki vera við at taka eitt tak fyri at dagføra støðina á Hagaleitið. So umhvørvistilvitandi er landsstýrið, sum nú hevur tvey politisk umboð og eitt embætisumboð á ráðstevnuni í Johannesburg!!!

Vónandi fær Eyðun Eltør onkran ílástur í Suðurafrika, men hann skal eisini fáa okkurt meira at hugsa um á hesum stað, tí nógv kann nevnast afturat, sum vísir, at vit eru umhvørvisligur eftirbátur við lít!

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Sambandsflokkurin - ætlaða útbyggingin á Eiði

– og okkara støða sum heild viðv. NATO

Johan Dahl, næstaform. í Uttanlandsnevndini

Tað skal ongin ivi verða um, at Sambandsflokkurin altíð hevur verið fyri NATO og tí, sum hesin felagsskapur stendur fyri - hann er eisini okkara trygd og verja, um kríggj skuldi brostið á í okkara parti av heiminum.- og tí er tað eisini ein sjálvfylgja í okkara verð, at vit skulu arbeiða saman við hesum felagsskapi og stuðla honum í tiltøkum, sum eru við til at fremja trygdina í heiminum, og hesum er ætlaða SSSB støðin á Eiði eisini ein nátturligur partur av.

Tað at hetta mál ikki er avgreitt í uttanlandsnevndini enn er heilt einkult tí, at vit sum eru limir har, orsakað av teimum enn galdandi samtyktunum hjá løgtinginum viðv. Føroyum og hernaðarligu støðu tess ikki meta, at vit kunnu gera nakað við hetta mál, fyrrenn aðalorðaskifti og uppdatering/broytingar av verandi samtyktum er farin fram í Løgtinginum.

Tó er neyvan nakað at ivast í, at broyingar koma at verða gjørdar, og at flestir flokkar á løgtingi fara at taka undir við hesi ætlan.

Heimurin er nógv broyttur, síðan kalda kríggið, tá hesar samtyktir vórðu settar í gildi av løgtinginum og meta vit, at tíðin er vorðin búgvin at nútímansgera hesar samtyktir og gera okkara støðu upp, hvar vit vilja standa verjupolitiskt í framtíðini.

Eisini er umráðandi, at vit gera brúk av okkara møguleikum í ríkisfelagsskapinum, og at vit verða við sum ein virkin partur framyvir, táið tað um Føroyar og føroyskt landa- og sjóøki ræður á verjupolitiska økinum.

Tað er bert at gleðast yvir, at Fólkaflokkurin eisini hevur lagt á okkara bógv og vil nú virka fyri, at NATO fær gjørt hesa útbygging - teir hava annars verið ímóti at NATO virkaði í Føroyum áður.

Partapolitisku propagandaina hjá formanninum í uttanlandsnevndini sum fór fram uppundir vitjanina hjá Anders Fogh Rasmussen skal eg lata fara aftur við borðinum hesaferð, men vil heita á hann um eina arðu fer at halda seg til tað, sum er felt niður í gerðabókina – og sannleikan.

Kald en spade for en spade - om registreret partnerskab



Peter O.K. Olofson, Klaksvík

Accept af homoseksuelt samliv, registreret partnerskab, kirkelig velsignelse, adoptionsmuligheder, osv., sådan kender vi udviklingen fra andre lande. I flere af artiklerne i Dimmalætting på det sidste, har der været gjort ihærdige forsøg på at fortælle os, at spørgsmålet om registreret partnerskab ikke skal ses som et religiøst/kristeligt spørgsmål men et juridisk. Det er et spørgsmål om arveret. Og er det ikke rimeligt, at f.eks. to mænd eller to kvinder, der bor i samme hus med fælles husholdning kan arve hinanden? Det korte af det lange er, at selvfølgelig kan de arve hinanden, og hvis der er politisk flertal for, at to-tre eller fire mænd eller kvinder eller to-tre eller fire søskende, der bor sammen og har fælles husholdning, skal kunne arve hinanden på samme vilkår som ægtefæller, så er det blot at vedtage en lov, der siger, at det kan de. At det så beskærer indtægterne fra arveafgifterne er så en anden side af sagen. Men sagen handler netop ikke blot om arv, for så havde der ikke været nogen grund til at tale om registreret partnerskab, og så havde der ikke været nogen grund til, at det kun skulle handle om to mænd eller to kvinder, sådan som loven om registreret partnerskab gør. Kald dog en spade for en spade og en skovl for en skovl.

Sig dog åbent og ærligt: Vi ved godt, at vi på dette punkt indtil nu, har bygget landets lovgivning på kristen grund, og dermed på den gudgivne skaberorden, at mand og kvinde er skabt til at leve sammen i ægteskab. Men vi tager med åben pande opgøret med dette grundlag, og ønsker ikke længere, at landets lovgivning på dette punkt skal være funderet i f.eks. de ti bud. Hele sagen er jo netop en kamp mellem hedenskab og kristentro. Men ligesom enhver kristen skal adlyde øvrigheden, hvis ikke den tvinger os til at handle imod Guds bud, sådan vil enhver kristen også fastholde øvrigheden (herunder de 7 lagtingsmedlemmer, der siger ja til registreret partnerskab, og de, der siger, at de er i en ventesituation) på, at deres myndighed til styre er gudgiven, og det er kun det menneske, der forkaster Gud og sætter sig i hans sted, der vedtager love imod Guds vilje.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari: Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Rullandi redaktionin:
tel. 220507

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Føroyskur partabrævamarknaður - ongan skund

Áðrenn vit fara undir ein føroyskan partabrævamarknað, mugu vit gera okkum greitt hvat vit vilja á tí tilfeingispolitiska økinum. Verða tað partabrøv, ella ræðisrættindini yvir tilfeinginum, sum skulu handlast?

Nøktandi lóggáva á tilfeingisøkinum er ein avgjørd fyritreyt, áður enn vit fara undir at handla partabrøv alment.

Sjúrður Guðjónsson

Tosið og skrivingin um ein føroyskan virðisbrævamarknað hevur í stóran mun snúð seg um handil við partabrøvum - at fáa føroyingar og møguliga útlendingar at keypa partabrøv í føroyskum fyritøkum, soleiðis, at fyritøkurnar á tann hátt fáa størri eginfigging - og harvið í minni mun lána pening úr eitt nú teimum føroysku peningastovnunum. Lánibrævamarknaðurin (obligatiónismarknaðurin) hevur ikki fingið líka nógva umrødu, tá tað snýr seg um føroyskar fyritøkur.

Spurningarnir eru tí:

• Er tað betur fyri ta føroysku fyritøkuna at hava ein stóran eigaraskara at figgja fyritøkuna, enn at læna kapitaltørvin úr peningastovnunum?
• Hvørji motiv hava føroyingar - tað verði seg privat, fyritøkur, peningastovnar, tryggingar, eftirlønargrunnar og tað almenna - at keypa partabrøv, heldur enn at hava peningin standandi í peningastovninum ella í lánsbrøvum?
• Er ætlanin at útlendingar skulu hava fría atgongd til partabrævamarknaðin, og hvørji motiv hava teir?

Tað eru tveir figgingarháttir fyri eina fyritøku (partafelag):

1.Eginfigging (partapeningur og yvirskot, sum liggur eftir í fyritøkuni).
2.Lánsfigging (frá peningastovnum, frá veitarum ella sum lánsbrøv).

Um hugt verður nærri at hesum báðum figgingarháttum, eginfigging - lánsfigging, eru nakrir grundleggjandi munir.

• Tað er partapeningurin, sum eigur og stýrir fyritøkuni.
•Partapeningurin kann ikki vera afturgoldin, uttan lánveitarin gongur við til tess.
• Lánspeningurin hevur óavmarkaðan rætt til afturgjalding - umframt rentu.

Eginfigging

Her sæst týðuliga at partapeningurin hevur ein størri váða knýttan at sær enn eitt nú lánspeningurin. Har bankin sigur við eina fyritøku, at nú vilja vit ikki læna tykkum meira pening, tí vit meta váðan vera ov stóran, hevur fyritøkan bert at kalla ein møguleika eftir, og tað er at hækka partapeningin við nýtekning.

Um nú illa veit við, og felagið fer á húsagang, verða tað fyrst og fremst lánsveitarnir, sum fáa sín pening aftur. Um nakað leypir av, fáa partaeigarnir tað.

Spurningurin er so, sum eg byrjaði við, er tað betur fyri virkið at vera figgjað við eginfigging heldur enn lánsfigging?

Hesin spurningur er sjálvandi ikki lættur at svara, men tað, sum hevur størstan týdning fyri virkið er, hvør av hesum báðum møguleikunum er tann bíligari. Heldur ikki her er nakað eintýðugt svar. Her velst um hvørji motiv íleggjararnir hava. Um teir hava sett partapening í fyritøkuna við tí fyri eygað at fáa størri avkast enn t.d. at hava peningin á bók ella í lánsbrøvum, kann fyritøkan fáa ein trupulleika. Partaeigarnir kunnu í prinsippinum drena fyritøkuna fyri gjaldfyri ígjøgnum stórt vinningsbýti.

§ 112 í partafelagslógini roynir tó at forða hesum, við tað, at tað er nevndin í felagnum, sum ásetur vinningsbýti.

Aðalfundurin, har allir partaeigarnir kunna verða umboðaðir, kann ongantíð seta vinningsbýti hægri enn nevndin hevur tilmælt. Hetta kann tó vera ein stokkutur uggi fyri nevndina, sum roynir at halda sum mest av yvirskoti eftir í fyritøkuni, tí partaeigarnir kunna altíð á aðalfundum, velja nýggja nevnd, sum so vónandi - fyri partaeigarnar - er meira "villig" til at lata størri vinningsbýti.

Lánsfigging.

Lánsfigging - fígging úr peningastovni ella við lánsbrøvum kann í flestu førum, vera líka góð.

Tann, sum figgjar hevur stórt sað bara eitt motiv, og tað er at læna pening út fyri ein ávísa rentu. Fíggingarstovnurin hevur ongar ætlanir um at ogna sær ræðisrættindir á t.d. fiskiloyvum, aliloyvum v.m. Men sum trygd taka teir veðhald í ognunum hjá fyritøkuni.

At hava ein ella heilt fáar lánsveitarar, er fyri fyritøkuna lættari at umsita enn nógvir ónøgdir partaeigarar. Rentan, sum verður ásett fyri ávís tíðarskeið, kann tó svinga nakað, avdrøgini falla tó eftir einum skema. Á sama hátt er tað við lánsbrøvum. Virkið veit nær lánsgjøldini falla og hvussu nógv gjaldast skal hvørja ferð.

Sum skilst hava føroysku peningastovnarnir sera gott nýggjum partaeigarum.

Tær føroysku fyritøkurnar eru ofta familjufyritøkur við fáum partaeigarum. Eisini eru fleiri fyritøkur, har partaeigarnir rokna partabrøvini sum eina trygd fyri teirra arbeiðsplássi. Hesir partaeigarar vilja, umframt at varðveita bæði arbeiði og partabrøv, heldur ikki drena felagið fyri vinningsbýti. Heldur eina sterka trygga fyritøku og trygt arbeiðspláss, enn at taka vinningsbýti úr felagnum.

Hetta merkir, at tey partabrøv, sum fara at verða skrásett á einum føroyskum virðisbrævamarknað, verða partabrøv í teimum heldur ivasomu fyritøkunum, also teimum, sum ikki geva serligan vinning. Harumframt partabrøvini á teimum almennu fyritøkunum, um politiskur vilji er til tess.

Politiska samansetingin verður helst altíð soleiðis í Løgtinginum, at tað ongantíð verða meira enn 49% av almennu partabrøvunum, sum verða umsetilig.

Hvørji eru keypsmotivini?

Hvørji eru so keypsmotivini. Tað keypsmotivið, sum uttanlands hevur størstu drívkraftina á partabrævamarknaðinum er uttan iva møguleikin fyri stórum avkasti til íleggjarnar. Í minni mun ræðisrættindini í teimum ymisku feløgunum. Hetta tí at gjøgnumskygni er so lítið. Tað er trupult uttanlands, at fáa ræðisrætindini á feløgunum, sum eru skrásett á børsinum. Tað ber til, men er sum sagt trupult við tað, at partaeigaraskarin er aloftast bæði stórur, spjaddur og skiftandi vegna skjóta umsetningsferð á partabrøvunum.

Í Føroyum verður gjøgnumskygni nógv størri. Tað verða nógv færri eigarar, og føroyingum líkt, so verður ikki keypt í dag og selt ímorgin. Umsetningsferðin á partabrøvunum verður allarhelst væl seinni her enn uttanlands.

Tað størra gjøgnumskygni fer eisini at gera, at keypsmotivini, umframt vinningsbýtið, í stóran mun fara at snúgva seg um ræðisrættindini, og serliga ræðisrættindi yvir avmarkaðum tilfeingi, so sum fiski- og aliloyvum.

Um hugt verður eftir teimum 4 almennu partafelognum, Føroya Fiskavirking, Kósini, Atlantsflogi og Føroya Tele, so vísa roknskapirnir fyri 2000 og 2001 at fyritøkurnar tilsamans hava goldið 6 mió. kr. í vinningsbýti um árið (2,9%). Partapeningurin í nevndu feløgum er áljóðandi 208 mió. kr. Um nevndu 208 mió. kr. t.d. vóru seldar á partabrævamarknaðinum til kurs 200 hevði avkastið verið 1,45% um árið til íleggjarnar. Leggjast skal eisini afturat, at hetta hava verið 2 sera góð ár fyri føroyskar fyritøkur.

Ivasamt um nakar føroyingur hevði verið so bláoygdur at keypt tílík partabrøv, við vinningsbýti sum motiv. Heldur hevði tá motivið verið ræðisrættindi. Um hugsa verður um eftirlønargrunnar, tryggingar, bankar v.m. verður púrt onki at fara eftir á tí føroyska partabrævamarknaðinum. Hesir stovnar eru allarhelst ikki áhugaðir í ræðisrættindunum, men vilja hinvegin plasera peningin har hann gevur mest og samstundis er tryggastur.

Útlendingar.

Her er tað at tvístøðan tekur seg upp, um vit skulu loyva útlendingum framat á tí føroyska virðisbrævamarknaðinum. Tað er givið, at útlendingar fara ikki at keypa partabrøv við vinningsbýti fyri eyga, ikki uttan so at partabrøv í meira áhugaverdum feløgum veru til sølu, so sum feløg í nótaflotanum, flakatrolararnum, alifyritøkunum og øðrum feløgum, sum sita á onkrum avmarkaðum tilfeingi. Heldur verður motivið hjá útlendingum, at teir í longdini fáa atgongd og síðani ræðisrættindini yvir okkara avmarkaða tilfeingi.

Samanumtikið

Dugi tí ikki at síggja tað neyðuga í at seta á stovn ein føroyskan virðisbrævamarknað í bræði. Í øllum førum ikki tann partin, sum hevur við partabrøv at gera. Fyri virkið er tað líkamikið um virðisbrævamarknaðurin er ella ei. Kann ganga við til, at onkrar einstakar fyritøkur kundu fingið nyttu av hesum, men sum heild fær partabrævamarknaðurin lítlan og ongan týdning fyri tær føroysku fyritøkurnar.

Fyri teir potentiellu partabrævakeyparnar hevur virðisbrævamarknaðurin heldur ongan reellan týdning, bert sum spekulatión í tilfeingisrættindum, og tað kann ongantíð vera ætlanin við einum føroyskum virðisbrævamarknaði.

Sum nevnt, so sær tað út til, at nærum einasta motivið fyri handli við føroyskum partabrøvum verður ræðisrættindi yvir tilfeinginum. Tí mæli eg staðiliga til, áðrenn vit fara undir ein føroyskan partabrævamarknað, at vit gera okkum greitt hvat vit vilja á tí tilfeingispolitiska økinum. Tað hevur nógv stórri týdning fyri føroyka samfelagið at hava ein skipaðan tilfeingispolitikk, enn at skunda ein partabrævamarknað ígjøgnum.

Politikkur er ein spurningur um raðfestingar, so her átti ikki nakað ivamál at verið.

Tórshavn, 27. august 2002



Brandt Blomberg

Hvítvørur til føroyska húsarhaldið
* Glas keramikk plátur
* Yvir- og undirvarma
* Heita luft

prísur fyrr 7.995,-
Nú 6.995,-

pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460

Sosialurin -tað loysir seg